Búskapur og vinna:

## Taka nú undir við evruni

Alt fleiri og fleiri bretar taka nú undir við, at felags evropeiska gjaldoyrað, evran, eisini verður sett í gildi í Bretlandi. Ein meiningakanning í blaðnum Financial Times vísir, at 43 prosent av teimum spurdu høvdu tikið undir við evruni, var fólkaatkvøða nú. 51 prosent siga, at tey høvdu atkvøtt ímóti.

Hóast meiriluti framvegis er ímóti evruni í Bretlandi, vísir kanningin, at meirilutin minkar. Fyri einum lítlum ári síðani vísti ein tilsvarandi kanning, at munurin millum ja og nei var 27 prosent stig. Nú er hann bara átta.

Av teimum 15 ES-londunum eru tað bara Bretland, Danmark og Svøríki, sum ikki hava sett evruna í gildi. Stjórnin í London hevur boðað frá, at hon fer at leggja málið út til fólkaatkvøðu, tá ávísar búskaparligar fyritreytir eru loknar.

## Størri stuðul

Danska stjórnin ætlar sær at økja stuðulin til londini í Eysturevropa. Upprunaliga var ætlanin at lata londunum 800 mió. krónur í ár og næsta ár, men nú er avgjørt at hækka stuðulin 1,1 mia. krónur, so hann verður 1,9 mia. krónur um árið hesi bæði árini. Endamálið við tí økta stuðlinum er at skunda undir verkætlanir, sum ætlandi skulu verða lidnar, áðrenn tey flestu eysturevropeisku londini koma upp í ES frá 2004.

## Vánaligt úrslit

Stóra svensk-sveitsiska fyritøkan ABB hevði 114 mió. dollarar í halli tríggjar teir fyrstu mánaðarnar í ár. Samanborið við sama tíðarskeið í fjør er úrslitið í ár vánaligt, tí fyrsta ársfjórðing í 2001 hevði ABB 138 mió. dollarar í avlopi. Samstundis vísa tølini fyri fyrsta ársfjórðing í ár, at bíleggingarnar hjá ABB eru 19 prosent minni verdar enn í sama tíðarskeiði í 2001.

Hóast tað er vánaligt, so er úrslitið betri, at marknaðurin hevði væntað.

UTTAN ÚR HEIMI

# Ísrael vil ikki samstarva við ST-kanningarnevnd



*Hendan loftmyndin av Jenin prógvar orðini hjá ST-senmdimanninum Terja Rød Larsen um, at Jenin líkist mest einum jarðskjálvtaøki*

*Mynd: Reuters*

**Ísraelska stjórnin er misnøgd við, at tann serliga kanningarnevndin skal ikki kanna ísraelsku pástandirnar um, at flóttafólkalegan Jenin var miðstøð hjá palestinskum yvirgangsmonnum**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*

Upprunaliga segði ísraelska stjórnin seg vera til reiðar at góðtaka, at ST sendi eina nevnd til palestinsku flóttafólkaleguna Jenin á Vestara Áarbakka at kanna, hvat var hent har undir ísraelsku hersetingini. Samstundis segði stjórnin seg vera sinnaða at samstarva við nevndina, men gjáramorgunin boðaði ísraelska útvarpið frá, at stjórnin hevði tikið tilsøgnina aftur.

Stutt eftir segði ST-aðalskrivarin, Kofi Annan, at hann hevði gjørt av at útseta Miðeystur-ferðina hjá nevndini.

Sambært ST-talsmonnum tók aðalskrivarin avgerðina, eftir at ísraelski ST-sendiharrin, Yehuda Lancry, hevði boðað honum frá, at Ísrael er ikki heilt nøgt við nevndina, og at ísraelska stjórnin heldur tað vera rætt at manna nevndina við fleiri hernaðar- og yvirgangsserfrøðingum. Samstundis hevði Lancry gjørt greitt, at ísraelska stjórnin eisini vil hava nevndina at kanna yvirgangsvirksemið, sum hevði miðstøð í Jenin, og sum sambært sendiharranum var orsøkin til, at ísraelski herurin fór inn í leguna.

Talsmenn hjá Kofi Annan søgdu í gjár, at aðalskrivarin hevði valt at bíða við at senda kanningarnevndina til Miðeysturs, men at nevndin væntandi fer avstað leygardagin.

Hinvegin gjørdu ST-talsmenninir greitt, at aðalskrivarin hevur ongar ætlanir um at manna nevndina øðrvísi, enn hann hevur gjørt, men at hann kanska fer at lata nevndina fáa fleiri serfrøðingar við sær.

Í sjálvari kanningarnevndini eru fyrrverandi finski forsetin Martti Ahtisaari, fyrrverandi flóttafólkahákommiserurin hjá ST, japanarin Sadako Ogata, og fyrrverandi aðalskrivarin í Altjóða Reyða Krossi, sveitsarin Cornelio Sammaruga.

# Geislavirkin leki í Sellafield

**Geiðslavirkin evni eru runnin úr kjarnorkuendurvinningarverkinum Sellafield og niður í grundvatnið undir verkinum.**

UMHVØRVI
*Árni Joensen*

Bretska blaðið The Guardian skrivaði í gjár, at nakrir 50 ára gamlir tangar á kjarnorkuendurvinningarverkinum Sellafield eru farnir at leka. Fleiri túsund tons av geiðslavirknum evnum eru í tangunum, og myndugleikarnir hava sett eina skjóttarbeiðandi nevnd at kanna lekan og møguligar avleiðingar. Nevndin skal eisini kanna, hvat skal gerast fyri at forða fyri, at tey geiðslavirknu evnini, sum eru runnin úr tangunum, koma í samband við drekkivatnið.

Seinastu árini hevur fleiri ferðir verið nevnt, at vandi kundi vera fyri leka á Sellafield-verkinum. Myndugleikarnir hava nýtt meiri enn eina milliard krónur til at byggja nýggjar tangar, men arbeiðið hevur tikið longri tíð enn ætlað.

The Guardian skrivar, at eftirlitsmenn hjá bretsku kjarnorkumyndugleikunum varnaðust lekan í november í fjør. Royndir at bora niður í jørðina nærhendis verkinum vístu, at geiðslavirkin evni vóru í jørðini.

Sambært blaðnum var talan um evnið technetium 99. Norska stjórnin hevur fleiri ferðir mótmælt, at hetta evnið rennur frá verkinum út í Írska Havið og haðani við streyminum inn í norskan sjógv.

Bretsku kjarnorkumyndugleikarnir siga í einari fyribilsfrágreiðing, at sum er nýtist almenninginum ikki at stúra, men at kanningarnar halda fram. M. a. er ætlanin at kanna, hvussu nógv technetium 99 er likið úr teimum gomlu tangunum, um onnur geiðslavirkin evni eru runnin úr tangunum, og um tangarnir framvegis leka.

Úr Norðurlondum:

## Einki siglingarloyvi

Norska løgreglan hevur avdúkað, at ein trolari í Sunnmøre fiskaði í fýra ár uttan neyðugt siglingarloyvi. Hetta var í tíðarskeiðinum frá august í 1996 til august í 2000. Málið er tað álvarssamasta av sínum slagi higartil, og løgreglan hevur ákært bæði reiðaríið og skiparan.

Løgreglan hevur kravt, at reiðaríið skal fáa í hvussu er 100.000 krónur í bót, og at skip arin missir pappírini. Løgreglan sigur, at tá hon kannaði trolaran, sum eitur Hopen, kom hon fram á 33 ymisk brek umborð - men einki siglingarloyvi.

## Light skal burtur

ES hevur gjørt av, at orðini "light" og "mild" skulu av sigarettpakkunum eftir tann 1. oktober, og danska stjórnin hevur boðað frá, at hon ætlar at fylgja boðunum longu frá fyrsta degi.

Í felagsskapinum Kræftens Bekæmpelse fegnast tey um avgerðina hjá ES og stjórnini. Sagt verður, at orðini "light" og "mild" eru villleiðandi, tí tað eru líka nógv skaðilig evni í hesum sigarettunum sum í teimum, ið ikki hava merkingina. Tí er tað beinleiðis skeivt at lýsa við teimum báðum orðunum, sigur felagsskapurin.

Tann nýggja reglan ber í sær, at minni tjøra skal vera í sigarettunum, og at eitt nýtt hámark skal setast fyri nikotininnihaldið.

## Latin barnavernd

Norsku barnaverndarmyndugleikarnir viðgjørdu í fjør meiri enn 2600 mál um viðurskiftini hjá børnum, og í 538 málum endaði tað við, at børn vórðu tikin frá foreldrum. Tað eru 46 fleiri enn árið fyri. Sambært norskum bløðum snúðu nógv av málunum seg um børn, hvørs foreldur vóru rúsevnismisnýtarar ella sálarliga sjúk.

ítróttur

Nr. 78 • hósdagur • 25. apríl 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Akranes á vitjan

**Sunnudagin klokkan 15 verður forvitnisligur dystur millum meistararnar í Føroyum og Íslandi. ÍA av Akranesi og B36 úr Havn bresta saman í hesum dystinum, og ætlanin er, at hetta verður eitt afturvendandi tiltak**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Ferðalagið úr Íslandi kemur til Føroya fríggjadagin, og sunnudagin møtast liðini í Gundadali. Dysturin verður nevndur Atlantic Cup, og vinnandi liðið fær steyp handað. Ætlanin er, at hetta skal vera ein afturvendandi dystur, sum verður á hvørjum ári.

Annað hvørt ár skal Atlantic Cup spælast í Føroyum og annað hvørt ár í Íslandi. Lagt verður fyri í Føroyum.

Fríggjadagin skal B36 spæla fjórðingsfinalu móti HB í kappingini um Løgmanssteypið. Ætlanin var upprunaliga, at hálvfinalan skuldi spælast sunnudagin, men um B36 kemur víðari í kappingini, so verður hálvfinalan útsett.

Atlantic Airways og Icelandair stuðla tiltakinum saman við grunninum FITUR, sum hevur til endamáls at menna samstarvið millum londini í Útnorði.

Ætlanin er at byggja hetta tiltakið upp til nakað stórt, so at áskoðarar og leikarar fáa áhuga fyri hesum dystinum. Komandi ár er møguligt at skipað verður fyri vikuskiftistúri til Íslands í sambandi við dystin, so at talið av ferðandi til dystirnar kann økjast.

### Borgarstjóri tók stig til vitjan

Tá borgarstjórin í Akranesi var á vitjan í Føroyum í sambandi við undirsjóvartunnilin til Norðoyggjar, tosaðu hann og formaðurin í B36 saman um møguleikarnar at skipa fyri einum dysti millum meistararnar í báðum londunum.

Síðani komu FSF og íslendska fótbóltssambandið við í fyrireikingarnar, og stuðul var samstundis fingin úr grunninum FITUR.

– Vit vildu hava sambondini í báðum londunum við í fyrireikingarnar, tí næsta ár eru kanska nøkur onnur lið, ið skulu kappast um steypið. Tá kunnu sambondini taka endan, so kappingin ikki dettur niðurfyri, sigur Kristjan á Neystabø.

Dysturin verður leiktur á ovara vølli í Gundadali. Spurningurin var, um dysturin ikki skuldi leikast á Tórsvølli, men partarnir vóru samdir um, at tað kanska er nakað tíðliga at fara á Tórsvøll, og hýrurin kring vøllin er betri í Gundadali. Lassin Isaksen fer at døma dystin, og Tummas Pauli Olsen og Jens Albert Simonsen eru hjálpardómarar.

### Akranes

ÍA er eitt tað mest sigursvanda felagið í Íslandi. Í nítiárunum vann felagið fimm meistaraheiti á rað frá 1992 til 1996. Síðani vann felagið aftur meistaraheitið í fjør. Tað var seytjanda ferðin, at liðið vann meistaraheitið. Liðið hevur altíð spælt við í bestu deildini í Íslandi.

Liðið er bara mannað við íslendskum leikarum, og hetta er óvanligt í Íslandi, har fleiri lið hava útlendskar leikarar í hópinum. 27 ára gamli Gunnlaugur Jónsson varð í fjør kosin ársins leikari í Íslandi. Grétar Steinsson hjá ÍA varð kosin besti ungi leikarin í Íslandi í fjør.

Royndasti leikarin er málverjin Ólafur Þórðarson, sum hevur spælt 368 dystir á besta liðnum hjá ÍA. Hann spældi sín fyrsta dyst í 1982, og hann hevur spælt 70 landsdystir fyri Ísland. Hann hevur sjey ferðir verið meistari, og seks ferðir hevur hann vunnið steypakappingina.

Akranes er annars ein lítil býur beint norðanfyri Reykjavík við 5700 íbúgvum.



*Sunnudagin bresta meistararnir úr Íslandi og Føroyum saman í fyrsta dystinum í Atlantic Cup. B36 vann meistaraheitið í fjør og skal tí møta meistaraliðnum úr Íslandi*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Argja Róðrarfelag havt aðalfund

**Argja Róðrarfelag hevur havt aðalfund, og nýggj nevnd er vald. Johannis Johannesen er formaður, og felagið arbeiðir við at skifta bátarnar**

KAPPRÓÐUR
*Stefan í Skorini*



*Argja Róðrarfelag og Argjabáturin, fremst á myndini, hevur aftur í ár ætlanir um at vera við í oddinum*

Á aðalfundinum varð nýggj nevnd vald. Johannis Johannesen er formaður, Rúni Johannesen er næstformaður, Johnny Mikkelsen er skrivari, Fróði Olsen er kassameistari og Hans Eivind Olsen er nevndarlimur.

Felagið sigur í tíðindaskrivi, at tað arbeiðir við at skifta bátarnar út. Í fjør fekk felagið nýtt 5-mannafar, sum kallast Blikur. Til kappingarárið í ár hevur felagið fingið nýtt 8-mannafar, sum er Argjabáturin, og 6-mannafarið Lómur verður skift út komandi ár, tá nýggjur bátut skal byggjast. Tað er Sámal Hansen, ið smíðar nýggju bátarnar.

Bátarnir eru mannaðir til kappingina í ár, og tær eru so at siga tær somu sum í fjør. Felagið dylur ikki fyri, at vónirnar at fáa góð úrslit komandi kappingarár eru góðar.

Til at betra um umstøðurnar og venjingarstøðuna hjá rógvarunum hevur felagið útvegað fýra nýggjar rógvimaskinur, so at rógvararnir kunnu venja meira støðugt.

Til at útvega pening til virksemi í felagnum skipar Argja Róðrarfelag fyri neytamykjukapping 11. mai. Róðrarneystið á Argjum, sum tekur 200 fólk, verður eisini leigað út til veitslur, brúdleyp, dans og annað.

Felagið hevur í ár 20 ár á baki, og hevur felagið í hesum tíðarskeiðnum vunnið fleiri enn hundrað steyp til ognar.